ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

29. juni 2020
**Mál**: 20/00575-2
**Tygara skriv**:
**Viðgjørt**: Barbara Álvsdóttir Thomsen

**Nr. 108/2019**

**Svar uppá fyrispurning eftir tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur viðvíkjandi endurskoðan av eldraøkinum, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Nær ætlar landsstýrismaðurin at seta gongd á arbeiðið við at eftirmeta eldraøkið saman við kommununum, soleiðis sum lógin um heimatænastu og eldrarøkt frá 2015 ásetir?
2. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at leggja hetta arbeiðið til rættis, soleiðis at eftirmetingin á ein skipaðan hátt greinar og lýsir allar viðkomandi tættir, grundað á tær royndir, sum eru gjørdar, síðani kommunurnar yvirtóku ábyrgdina av økinum?

**Viðmerkingar:**
Tá ið ábyrgdin fyri eldraøkinum var áløgd kommununum 1. januar 2015, varð ásett, at lógirnar, sum skipa eldraøkið, skuldu endurskoðast fimm ár eftir, at lógirnar vóru settar í gildi. Tað vil siga í 2020. Metast skal m.a. um, hvørt afturberingarleisturin er nøktandi, um markamótini millum kommunur og millum land og kommunur eru nóg greið, og um kommunalu samstørvini virka eftir ætlan, so tey eldru fáa nøktandi tænastur um alt landið.
Arbeiðið við nýggjari vælferðarlóg reisti eisini fleiri spurningar m.a. um avleiddan tørv á at gera broytingar í eldralógini.
Sambært lóg um heimatænastu og eldrarøkt er beinleiðis ásett, at lóggávan skal endurskoðast í 2020. Og í serligu viðmerkingunum til hesa áseting stendur, at endurskoðanin skal fara fram í samstarvi við Kommunufelagið. Tí eiga broytingar í eldralógini fyrst og fremst at verða gjørdar í framhaldi av eini eftirmeting, har fakligi førleikin, innlitið og áhugamálini í kommununum eisini eru umboðað, og ikki sum einvís stig frá landsstýrinum.
Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

**Á Løgtingi, 18. juni 2020**

Heðin Mortesen

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

**Svar:**

**Til nr. 1**

Tá ið avgjørt varð at leggja heimatænastu og eldrarøkt út til kommununar at umsita, varð eisini avgjørt at ein eftirmeting skuldi gerast av lógini. Hendan eftirmetingin skuldi gerast 5 ár eftir at lógin var komin í gildi.

Sambært viðmerkingunum, í álitinum frá Trivnaðarnevndini, til lógina um heimatænastu og eldrarøkt v.m. skal eftirmetingin fara fram í samstarvi við Kommunufelagið og møguligar aðrar partar í málinum.

Almannamálaráðið hevur havt innleiðandi fundir við Kommunufelagið, sum vit skulu samstarva við um eftirmetingina.

Landsstýriskvinnan hevur eisini havt fund við landsstýrismennirnir í fíggjarmálum og umhvørvis- og vinnumálum viðvíkjandi eftirmetingini av lógini um heimatænastu og eldrarøkt v.m., lógini um kommunalt samstarv um heimatænastu og eldrarøkt v.m. og fíggjarleistin.

**Til nr. 2**

Arbeiðið verður lagt til rættis í samráð við hinir luttakandi partarnir. Áðrenn ein arbeiðssetningur er endaliga viðgjørdur og semja er um hann, kann landsstýriskvinnan ikki útgreina, hvussu arbeiðið verður lagt til rættis.

Tórshavn 29. juni 2020

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur

landsstýrismaður